Álit um

# Gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy

Oktober 2011

**Innihaldsyvirlit**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur ........ 5
Inngangur ........ 6
1. Gott grundarlag fyri nýggjum tilboðum ........ 7
2. Tilmælini í stuttum ........ 8
2.1. Nýggjar útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy ........ 8
2.2. Seta á stovn Suðuroyar Skeiðsdepil í Skúladeplinum í Suðuroy ........ 9
2.3. Byggja næmingaheimið “Kumpassin við Skúladepilin í Suðuroy” ........ 9
3. Nýggjar útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy ........ 10
3.1. Pedagogatstøðisútbúgving í Skúladeplinum í Suðuroy ........ 11
3.2. Aðrar útbúgvingar ........ 16
Fylgiskjal 1. Danska kunngerðin um pedagoghjálparaútbúgving ........ 17
Fylgiskjal 2. Uppskot til tímaætlan ........ 18
Fylgiskjal 3. Uppskot til tímaætlan ........ 19
Fylgiskjal 4. Útgreining av lønarútreiðslum ........ 20
4. Suðuroyar Skeiðsdepil í Skúladeplinum í Suðuroy ........ 22
4.1. Bakgrund ........ 22
4.2. Suðuroyar Skeiðsdepil ........ 22
5. Næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy ........ 25
5.1. Bakgrund ........ 25
5.2. Tekningar ........ 25
5.3. Íbúðareindir ........ 26
5.4. Felagshús ........ 26
5.5. Kumpassin við Skúladepilin í Suðuroy ........ 26
5.6. Grønir bygningar ........ 30
5.7. Kostnaðarmeting ........ 30
5.8. Fígging ........ 31
5.9. Rakstrarætlan ........ 32
5.10. Arbeiðsætlan hereftir ........ 33
Fylgiskjal 1. Løgtingslóg um stuðul til næmingaheim ........ 34

## Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur

Á fundi í Skúladeplinum í Suðuroy 1. apríl 2011, sum Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, tók stig til, varð gjørt av at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við, hvussu Skúladepilin í Suðuroy betri kundi gagnnýtast.

Mentamálaráðið setti eftir fundin arbeiðsbólk. Í arbeiðsbólkinum hava sitið Dennis Holm (Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning), Søren L. Bruhn (Suðuroyar Sparikassi), Jórun Petersen (Heilsuskúli Føroya), Ole V. Laursen (Miðnámsskúlin í Suðuroy), Gudfinn Olsen (Miðnámsskúlin í Suðuroy) og Olaus Jespersen (Mentamálaráðið). Arbeiðsbólkurin valdi Dennis Holm sum formann.

Mentamálaráðið gav arbeiðsbólkinum henda arbeiðssetning:

*Arbeiðsbólkurin skal savna saman øll góð hugskot um betur at gagnnýta Skúladepilin í Suðuroynni, vísa á og greina ymsar møguleikar um, hvussu skúlin kann gerast ein vitanardepil, sum kann vera við til at styrkja Suðuroynna útbúgvingarliga, mentanarliga og vinnuliga: t.d. hvussu vit kunnu fjøltátta útbúgvingartilboðini, økja skeiðsvirksemi, fleiri mentanarlig tiltøk, fjarlestur, økt samstarv við aðrar skúlar, møgulig ferðavinnutiltøk o.a.*

*Eisini skal arbeiðsbólkurin koma við uppskoti til møguligar útbyggingar kring skúlan, so sum næmingaheim, ítróttarverkløg o.a.*

26. Oktober 2011

Dennis Holm
Arbeiðsbólkurin viðvíkjandi betri gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy

## Inngangur

Arbeiðsbólkurin hevur havt 6 fundir og hevur í arbeiðinum miðvíst lagt seg eftir at koma við ítøkiligum uppskotum um, hvussu Skúladepilin í Suðuroy betur kann gagnnýtast.

Arbeitt hevur verið út frá teirri sannføring, at neyðugt er at koma við greiðum og ítøkiligum uppskotum, sum kunnu setast í verk eftir stutta tíð, fáa tey politiska undirtøku. Heldur enn leysum uppskotum og hugsanum, sum krevja drúgt framhaldandi arbeiði, áðrenn tey kunnu gerast veruleiki.

Stutta tíðin til at loysa uppgávuna hevur havt ávirkan á, hvussu víða hevur verið gjørligt at fara. Arbeiðsbólkurin metir tó, at arbeiðssetningurin, sum Mentamálaráðið hevur sett bólkinum, er svaraður.

## 1. Gott grundarlag fyri nýggjum tilboðum

Í Skúladeplinum í Suðuroy, sum var tikin í nýtslu á vári 2009, eru í dag tveir skúlar. Miðnámsskúlin í Suðuroy, sum bjóðar út 3 ára studentsútbúgving, og Heilsuskúli Føroya, sum bjóðar út tvær yrkisfakligar útbúgvingar, heilsuhjálparaútbúgving (1 ár og 3 mánaðir) og heilsurøktaraútbúgving (1 ár og 10 mánaðir).

Tilsamans eru tað 39 lærarar við ymiskum útbúgvingum, sum eru knýttir at skúlunum báðum, antin í fullum størvum ella í tímasettum størvum. Fakliga fevna hesir lærarar víða, og tá aðrir fakbólkar í Suðuroynni verða tiknir við, so er greitt, at fakliga tilfeingið í oynni er breitt, tá umræður grundarlagið fyri at menna nýggj førleikamennandi tilboð við Skúladepilin í Suðuroy.

Førleikamenning er í dag vorðin ein avgerandi táttur, tá umræður bæði persónliga menning, menning av arbeiðsplássum og menning av samfelagnum í síni heild. Men avmarkaðu tilboðini um førleikamenning í Føroyum føra sum er í nógvum førum við sær, at okkara ungu í styttri ella longri tíðarskeið verða noydd at flyta av landinum. Fyri summi verður av somu orsøk talan um eitt frával av førleikamenning. Meðan valið um førleikamenning fyri onnur samstundis er eitt val, sum antin ger, at ein ikki flytur aftur til Føroyar ella ikki flytur heimaftur til økið, har barnaskógvarnir eru slitnir.

Fyri eitt økið sum Suðuroynna, har tilboðini um førleikamennandi útbúgvingar og skeið eru avmarkað, hevur tað týdning fyri bæði fólk, vinnulív og kommunalar- og landsstovnar, at tilboðini um førleikamenning gerast fleiri og meiri fjøltáttað. Tá farið varð undir arbeiðið at gera uppskot um størri gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy, gjørdist tó skjótt greitt, at nýggj førleikamennandi tilboð í Skúladeplinum í Suðuroy, ikki bert skuldu hava Suðuroynna sum málbólk, men allar Føroyar, og í ávísum førum eisini røkka út um landoddarnar.

# 2. Tilmælini í stuttum

Tilmælini um størri gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy eru býtt í trý, men kunnu tilmælini tó í ávísan mun tengjast saman.

Tilmælini eru í stuttum lýst niðanfyri í tilvildarligari raðfylgju. Meiri nágreinilig greining av tilmælunum er at finna seinni í álitinum

## 2.1. Nýggjar útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy

Arbeiðsbólkurin mælir til at seta á stovn pedagogatstøðisútbúgving í Skúladeplinum í Suðuroy, í Heilsuskúla Føroya.

Tørvurin á starvsfólki við pedagogiskari útbúgving, at røkja uppgávur á ymiskum stovnum, er sera stórur, og tørvurin verður ikki nøktaður í bræði. Fyri at sleppa undan, at ov nógv fólk uttan eina ávísa námsfrøðiliga útbúgving arbeiða á ymiskum stovnum, verður skotið upp, at skipað verður fyri pedagogatstøðisútbúgving, ið er ein styttri yrkisfaklig útbúgving enn pedagogútbúgvingin.

At hava eina pedagogatstøðisútbúgving knýtta at Heilsuskúla Føroya hevur stóran fyrimun, m.a. tí at heilsuútbúgvingarnar eru yrkisfakligar útbúgvingar, og fleiri av lærarunum, sum arbeiða í Heilsuskúla Føroya, hava fakligan førleika í lærugreinum, sum undirvísast skal í á pedagogatstøðisútbúgvingini. Harumframt eru í Miðnámsskúlanum í Suðuroy lærarar, sum eisini hava fakligan førleika at undirvísa í lærugreinum á pedagogatstøðisútbúgvingini.

Málbólkurin fyri pedagogatstøðisútbúgvingina er ungfólk uttan útbúgving eftir fólkaskúlan, við eitt ára skúlagongd eftir fólkaskúlan ella arbeiðsroyndum, og tilkomin fólk, m.a. dagrøktarmammur, hjálparar í barnagørðum, sambýlum og á dagstovnum, og stuðlar hjá børnum við ymiskum menningarligum og námsfrøðiligum tørvi.

Pedagogatstøðisútbúgving kann í fyrsta lagi byrja á Heilsuskúla Føroya 1. august 2012.

### 2.1.1. Aðrar nýggjar útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy

Við grundarlagi í fakligu førleikunum í Heilsuskúla Føroya og í Miðnámsskúlanum í Suðuroy er grundarlag eisini fyri at seta á stovn aðrar yrkisfakligar útbúgvingar og miðnámsúbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy.

Í Danmark er ambulancaføraraútbúgving skipað á heilsuskúlum. Framyvir fer kravið til umsøkjarar til ambulansaføraraútbúgvingar at verða, at hesi hava heilsurøktaraútbúgving. Tí er natúrligt, at henda útbúgving kundi ligið í Heilsuskúla Føroya.

Í samstarvi við aðrar miðnámsskúlar í landinum hevði eisini borið til at bjóða út aðrar miðnámsútbúgvingar, bæði handilsliga miðnámsútbúgving og SIT útbúgvingina á Tekniska skúla

*Víst verður eisini til undirskjal 1 um "Nýggjar útbúgvingar við Skúladepilin í Suðuroy"*

## 2.2. Seta á stovn Suðuroyar Skeiðsdepil í Skúladeplinum í Suðuroy

Førleikamenning er í dag vorðin ein avgerandi táttur, tá umræður bæði persónliga menning, menning av arbeiðsplássum og menning av samfelagnum í síni heild.

Fyri eitt øki sum Suðuroynna, har tilboðini um førleikamennandi útbúgvingar og skeið eru avmarkað, er tað tí av týdningi, at stig verða tikin til breitt at bjóða út fleiri førleikamennandi tilboð.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at settur verður á stovn Suðuroyar Skeiðsdepil, sum hevur til endamáls breitt at virka fyri førleikamenning í Suðuroynni, við øllum Føroyum sum málbólki.

Suðuroyar Skeiðsdepil er sjálvsognarstovnur knýttur at Skúladeplinum í Suðuroy.

Virksemið í Suðuroyar Skeiðsdepli skal m.a. fevna um:

- at skipa førleikamennandi skeið, útbúgvingar og eftirútbúgvingar
- saman við Heilsuskúla Føroya og Miðnámsskúlanum í Suðuroy at skipa nýggjar útbúgvingar
- at samskipa kunning og atkomiligheit til førleikamennandi útbúgvingar og eftirútbúgvingar umvegis fjarlestur
- at skipa onnur førleikamennandi tiltøk í Suðuroynni

*Víst verður eisini til undirskjal 2 "Suðuroyar Skeiðsdepil við Skúladepilin í Suðuroy"*

## 2.3. Byggja næmingaheimið "Kumpassin við Skúladepilin í Suðuroy"

Umframt ítøkilig tilmæli um fleiri útbúgvingar- og skeiðstilboð í Skúladeplinum í Suðuroy, mælir arbeiðsbólkurin eisini til, at eitt næmingaheim verður bygt við Skúladepilin í Suðuroy.

Eitt næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy fer at lætta um møguleikan hjá lesandi og skeiðsluttakarum at finna sær bústað í lestrar- og skeiðstíðini.

Eitt næmingaheim fer eisini at skapa betri grundarlag fyri, at Skúladepilin í Suðuroy við nýggjum útbúgvingar- og skeiðstilboðum kann gerast uppaftur meira týðandi partur av lokalsamfelagnum í Suðuroy.

Mælt verður til at byggja næmingaheimið "Kumpassin við Skúladepilin í Suðuroy". Næmingaheimið verður bygt við 11 íbúðareindum við 4 íbúðum í hvørjari eind, tilsamans 44 íbúðir. Hvør íbúð verður 36 $m^2$, og í hvørjari íbúð verða 2 kømur. Tilsamans verða tað sostatt 88 kømur á næmingaheiminum. Umframt íbúðareindirnar verður bygt eitt felagshús.

*Víst verður eisini til undirskjal 3 "Næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy"*

## 3. Nýggjar útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy

Endamálið við hesum partinum av verkætlanini viðv. "Gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy" er at kanna møguleikan fyri at seta á stovn nýggjar útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy.

Endamálið er harumframt at gera ítøkiligt uppskot um nýggja(r) útbúgving(ar) í Skúladeplinum í Suðuroy. Uppskot skulu fevna um lesi- og tíðarætlan og um kostnaðarætlan.

## 3.1. Pedagogatstøðisútbúgving í Skúladeplinum í Suðuroy

Arbeiðsbólkurin mælir til at seta á stovn pedagogatstøðisútbúgving í Skúladeplinum í Suðuroy, á Heilsuskúla Føroya.

Tørvurin á starvsfólki við pedagogiskari útbúgving at røkja uppgávur á ymiskum stovnum er sera stórur, og tørvurin verður ikki nøktaður í bræði. Fyri at sleppa undan, at ov nógv fólk uttan eina ávísa námsfrøðiliga útbúgving arbeiða á ymiskum stovnum, verður skotið upp, at skipað verður ein pedagogatstøðisútbúgving, ið er ein styttri yrkisfaklig útbúgving enn pedagogútbúgvingin.

At hava eina pedagogatstøðisútbúgving knýtta at Heilsuskúla Føroya hevur stóran fyrimun, m.a. tí at heilsuútbúgvingarnar eru yrkisfakligar útbúgvingar, og fleiri av lærarunum, sum arbeiða í Heilsuskúla Føroya, hava fakligan førleika í lærugreinum, sum undirvísast skal í á pedagogatstøðisútbúgvingini. Harumframt eru í Miðnámsskúlanum í Suðuroy lærarar, sum eisini hava fakligan førleika at undirvísa í lærugreinum á pedagogatstøðisútbúgvingini.

Við neyvt at ráðleggja hølisnýtsluna í Skúladeplinum í Suðuroy ber eisini til at hýsa pedagogatstøðis-útbúgvingini í Skúladeplinum í Suðuroy. Tó skal viðmerkjast, at á ávísum tíðarskeiðum í árinum verður hølistørvurin so mikið stórur, at arbeiðsbólkurin hevur lagt upp til, at eitt felagshøli nærindis skúlanum verður brúkt í undirvísingini.

Áðrenn útbúgvingin verður skipað, má lógarheimild umframt útbúgvingarkunngerð og námsætlan gerast fyri útbúgvingina.

### 3.1.1. Málbólkur

Málbólkurin fyri pedagogatstøðisútbúgvingini er ungfólk uttan útbúgving eftir fólkaskúlan, við eitt ára skúlagongd eftir fólkaskúlan ella arbeiðsroyndum, og tilkomin fólk m.a. dagrøktarmammur, hjálparar í barnagørðum, sambýlum og á dagstovnum, og stuðlar hjá børnum við ymiskum menningarligum og námsfrøðiligum tørvi.

Í Danmark er eisini vaksnamannaútbúgving sum pedagogatstøðingur, ætlað fólki yvir 25 ár, við viðkomandi yrkisroyndum í meira enn 2 ár. Henda útbúgvingin hevur ikki starvsvenjing. Umsøkjarar skulu annars lúka vanligar treytir fyri upptøku.

### 3.1.2. Endamálið við útbúgvingini

Endamálið við útbúgvingini er, at næmingurin fær vitan innan hesi yvirskipaðu førleikaøki:

#### *Fakligir førleikar*

Mennandi, fyribyrgjandi, vegleiðandi og stuðlandi námsfrøðiligar uppgávur í dagrøkt, dagstovnum, skúlum, sambýlum og dagtilboðum fyri borgarar við skerdum førleikum, bæði sálarligum og kropsligum og í egnum heimi.

Harumframt: mentanarligar og virksemisfremjandi uppgávur, kropsliga mennandi uppgávur, heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøk, umsorganarlíknandi uppgávur, eins og uppgávur innan samskipan-, dokumentatión- og eftirmeting (lutvíst úr donsku kunngerðini).

### *Umframt at menna persónligir førleikar*

Næmingurin skal undir útbúgvingini arbeiða við hesum persónligu førleikum (lutvíst úr donskum kunngerðini):

1. initiativ, sjálvstøðugleika, ábyrgdarkenslu og empati fyri at kunna møta øðrum menniskjum á etiskan og virðiligan hátt og at kunna síggja egnan leiklut í viðurskiftum menniskjum ímillum
2. evni til eginumsorgan og at veita umsorgan fyri øðrum á nærverandi og professionellan hátt.
3. hava fatan av týdninginum av samskifti fyri at menna og vera partur av dagligum og fakligum arbeiðsuppgávum.
4. evni til, útfrá egnum fysiskum, sálarligum, sosialum og mentanarligum tilfeingi at vera partur av samstarvi og uppgávuloysn.
5. innlit í lærutilgongdir og egnar lærumøguleikar og møguleikar fyri menning.
6. forvitni, skapan og opinleiki, og harvið hug til framhaldandi at menna seg og vera partur í broytingartilgongdum, harumframt evni at vera partur av sosialum og mentanarligum margfeldni.
7. menna førleikar í at vera uppsøkjandi, spyrjandi, og kritiskt at kunna virka til fulnar í óvæntaðum støðum, og
8. menna evnini at nýta eftirmeting og sjálvseftirmeting sum amboð í egnari læringar- og menningartilgongd.

Í metingini av persónligum førleikum, verður javnan, í samrøðum við næmingin, mett um áhuga, motivatión og vilja til at menna seg í útbúgvingini.

### 3.1.3. Innihald í útbúgvingini

Evnini í útbúgvingini eru hesi:

1. menning og læring
2. einstaklingurin (individ), organisatión og samfelag
3. skapandi evni og estetikkur
4. samskifti og samstarv
5. ítróttur, heilsa og lívsdygd
6. fakligur samleiki

### *Lærugreinar og undirvísing*

Pedagogatstøðisútbúgvingin fevnir um tilsamans 58 vikur skúlagongd, har vikurnar eru býttar í hesar lærugreinar.

**Yrkislærugreinar**

| | |
|---|---|
| Námsfrøði: | 9 vikur |
| Mentan og virksemi: | 9 vikur |
| Rørsla og ítróttur: | 6 vikur |
| Heilsulæra: | 5 vikur |
| Málið, samskifti og sálarfrøði: | 7 vikur |
| **Tilsamans** | **36 vikur** |

**Almennar lærugreinar**

| | |
|---|---|
| Danskt, C-støði: | 5 vikur |
| Samfelagslæra C-støði: | 5 vikur |
| Enskt C-støði: | 5 vikur |
| Føroyskt C-støði: | 5 vikur |
| **Tilsamans** | **20 vikur** |

*(Hetta eru vikur, sum eru álagdar í donsku kunngerðini.)*

**Vallærugreinar**

Til dømis

| | |
|---|---|
| Socialpædagogik: | 1 vika |
| Børn og náttúra: | 1 vika |
| **Tilsamans** | **2 vikur** |

### 3.1.4. Lesi- og tíðarætlan

Skúlatíðarskeiðini eru tilsamans 58 vikur, tá er lærugreinin føroyskt tikin inn við 5 vikum á C-støði. Umframt skúlatíðarskeiðið er starvsvenjing í 2 x 26 vikur.

Vegleiðandi býtið ímillum skúlatíðarskeiðið og starvsvenjing verður soleiðis:

| Skúli | Starvsvenjing | Skúli | Starvsvenjing | Skúla endi |
|---|---|---|---|---|
| 27 vikur | 26 vikur | 27 vikur | 26 vikur | 4 vikur |

Sí fylgiskjølini 2 og 3 fyri býtið av tímaætlan og nýtslu av hølum í Skúladeplinum í Suðuroy.

### 3.1.5. Kostnaðarætlan

Við útgangsstøði í royndunum frá heilsurøktaraútbúgvingini og útfrá útrokningum av krøvunum til undirvísing, fyrireiking og aðrar kravdar uppgávur, verður mett, at útbúgvingin fer at krevja uml. 3,5 ársverk afturat í Heilsuskúla Føroya. Hetta gevur eina samlaða útreiðslu uppá uml. 2,2 mió. kr. og samsvarar væl við núverandi játtan, ið er góðar 4,4 mió. til núverandi 2 útbúgvingar.

#### *Kostnaðarætlan av pedegogiskari atstøðisútbúgving*

Kostnaðarætlanin er grundað á, at ein flokkur av pedagogatstøðingum verður tikin inn um árið.

| | |
|---|---|
| Lønir (3,5 ársverk) [1] | Kr. 1.700.000 |
| Vegleiðaraviðbøtur [1] | Kr. 240.000 |
| Rakstrarútreiðslur [2] | Kr. 150.000 |
| **Lønir og rakstur um árið** | **Kr. 2.090.000** |

| | |
|---|---|
| Eykaútreiðslur 1. árið [3] | Kr. 130.000 |

**Ad. 1. Útgreinan av lønarútreiðslum og vegleiðaraviðbótum**

Tímalønt adjunktstarv svarandi til 1 ársverk: kr. 500.000.

Pedagogur við bachelorútbúgving og evt. socialpedagogur/ráðgevi svarandi til 2 ársverk: kr. 800.000

Leiðsluuppgávur og skrivarauppgávur 1 ársverk tilsamans: kr. 400.000.

Vegleiðaraviðbøtur í starvsvenjing, 20 næmingar í starvsvenjing (52 vikur) 12 mánaðir á uml. 1.000 kr. um mánaðin = kr. 240.000.

Mælt verður til, at næmingarnir undir útbúgvingini fáa lestrarstuðul frá Studna. Tað er umráðandi, at allir næmingar á sama skúla hava somu fíggjarligu skipan.

**Ad. 2. Rakstrarútreiðslur**

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar til uml. 1/3 av núverandi rakstrarútreiðslum í Heilsuskúla Føroya, ið eru kr. 450.000. Tað eru í løtuni 2 útbúgvingar við 3 flokkum í Heilsuskúlanum, og metingin er gjørd útfrá hesum.

**Ad 3. Eykaútreiðslur 1. árið**

Eykaútreiðslur 1. árið við byrjan av útbúgvingini verða mettar at verða tilsamans kr. 130.000, býttar soleiðis: Vegleiðing frá konsulenti frá donskum skúla 1-2 mánaðir. Løn, ferðing og uppihald uml. kr. 100.000,00. Umseting og nýskriving av lóg, kunngerð og námsætlanum, mett til uml. kr. 30.000,-

### 3.1.6. Útbúgvingin kann byrja

Pedagogatstøðisútbúgving kann í fyrsta lagi byrja í Heilsuskúla Føroya 1. august 2012.

#### *Ætlan fyri byrjanina*

Umsóknarfreist til miðnámsútbúgvingar í Føroyum er 15. mars. Skal umsóknarfreistin til pedagogatstøðis útbúgvingina eisini verða 15. mars, má lóg og kunngerð verða lýst áðrenn 15. mars (helst 15. februar 2012), fyri at grundarlag er hjá næmingum at søkja inn á pedagogatstøðisútbúgvingina.

Tveir mánaðir áðrenn útbúgvingin byrjar, verður 1 starvsfólk (lærari og ábyrgdari fyri undirvísingina) sett at taka sær av fyrireikandi arbeiði til at gera námsætlanir, útbúgvingarskipan og lesiætlan v.m. Hetta starv fer at innibera eina ávísa leiðsluábyrgd av pedagoglinjuni á Heilsuskúlanum. Ein mánað áðrenn byrjan verður eitt starvsfólk (lærari) afturat sett at fyrireika undirvísing v.m.

Ein konsulentur frá øðrum skúla (t.d. Social- og sundshedsskolen í Silkeborg), ið hevur royndir við pedagogiskari útbúgving, verður partur av fyrireikandi arbeiðinum í tilsamans 2 mánaðir, býtt soleiðis: Í umleið 1 mánað áðrenn útbúgvingin er byrjað, og harumframt verða til taks í umleið 1 mánað fyrstu tíðina, tá ið útbúgvingin er byrjað. Henda ætlan er gjørd í samráð við Social og sundhedsskolen í Silkeborg, ið hevur drúgvar royndir á økinum.

Ein mánað áðrenn útbúgvingin byrjar, verður ½ skrivarastarv sett at taka sær at skrivligum uppgávum, tá ið útbúgvingin byrjar.

#### *Uppskúling*

Mælt verður til at byrja við at útbúgva nakrar flokkar sum uppskúling av ófaklærdum medhjálparum á námsfrøðiliga økinum. Her verður hugsað um starvsfólk, ið hava viðkomandi arbeiðsroyndir á økinum, og sum hava verið í starvi í meira enn 2 ár, við uml. 25 arbeiðstímum í miðal um vikuna.

Uppskúlingarnæmingarnir skulu í høvuðsheitum bert fylgja ástøðispartinum í útbúgvingini. Skúlin mælir tó til, at næmingarnir hava tveir styttri starvsvenjingarpartar innlagdar, so at teir læra málini fyri starvsvenjingarpartarnar at kenna. Hetta fer at geva størri trygd fyri, at uppskúlingarnæmingarnir finna teirra fakliga samleika og kunnu virka sum fyrimyndir fyri onnur, tey skulu vegleiða í starvsvenjing.

Høvuðsorsøkin til hetta tilmælið er *í fyrsta lagi* at skunda undir fakligu menningina á námsfrøðiliga økinum. *Í øðrum lagi* er tað fyri at fáa vegleiðarar í starvsvenjing tøkar til teir næmingar, ið fylgja vanligu

útbúgvingargongdini. Tað er umráðandi, at næmingarnir, ið taka útbúgving sum pedagogatstøðingar, hava vegleiðarar í starvsvenjingini, sum virka sum fakligar fyrimyndir í leiklutinum sum pedagogatstøðingur.

### *Framhaldandi útbúgvingarútlit fyri pedagogatstøðingar*

Verandi skipan gevur ikki pedagogatstøðingum førleikar at søkja víðari í føroysku útbúgvingarskipanini. Natúrligt hevði verið, at ein pedagogatstøðingur hevði førleika at útbúgva seg víðari til pedagog í Føroyum. Hetta letur seg t.d. gera í donsku útbúgvingarskipanini, eisini við føroysku pedagogatstøðisútbúgvingini. Orsøkin til munin er, at pedagogútbúgvingin í Føroyum er á universitetsstøði og danska pedagog-útbúgvingin er á proffesiónsstøði. Pedagogatstøðisútbúgvingin hevur C-støði í almennum lærugreinum, og kravið um upptøku í Føroyum er A og B støði (miðnámsstøði).

Arbeiðast má fyri at geva pedagogatstøðingum møguleika at útbúgva seg víðari í Føroyum. Hetta kundi verið gjørt við at leggja miðnámsstøði inn í útbúgvingina í almennu lærugreinunum. Útbúgvingin kundi verið longd nakað, men mett verður, at við at samskipa almennar lærugreinar enn meira við yrkisfakini í útbúgvingunum kundu næmingarnir fingið møguleika at farið til próvtøku á A- og B-støði í ávísum lærugreinum. Henda loysn vildi verið tann smidligasta og mest gagnliga fyri næmingin, tá eitt alternativ annars er at taka lærugreinarnar sum sjálvlestur eftir lokna útbúgving. Tað fer at seinka næmingunum óneyðuga nógv við at koma út á arbeiðsmarknaðin.

## 3.2. Aðrar útbúgvingar

Við grundarlagi í fakligu førleikunum í Heilsuskúla Føroya og í Miðnámsskúlanum í Suðuroy er grundarlag eisini fyri at seta á stovn aðrar yrkisfakligar útbúgvingar og miðnáms útbúgvingar í Skúladeplinum í Suðuroy.

Í Danmark er ambulancaføraraútbúgving skipað í heilsuskúlum. Framyvir fer kravið til umsøkjarar til ambulansaføraraútbúgvingar at verða, at hesi hava heilsurøktaraútbúgving. Tí er natúrligt, at henda útbúgving kundi verið í Heilsuskúla Føroya. Víst verður til tilmælið, ið arbeiðsbólkur hevur latið gjørt fyri Almanna og Heilsumálaráðið í 2007 - "Rapport om Uddannelser og Udstyr indenfor det Færøske Præhospitalsberedskab".

Í samstarvi við aðrar miðnámsskúlar í landinum hevði eisini borið til at bjóða út aðrar miðnámsútbúgvingar, bæði handilsliga miðnámsútbúgving og SIT-útbúgvingina í Tekniska skúla.

## Fylgiskjal 1. Danska kunngerðin um pedagoghjálparaútbúgving

Danska kunngerðin um pedagoghjálparaútbúgving er her: http://www.uddannelsesadministration.dk/Uddannelsesordninger/14412/Tekst%20uddannelsesordning%20PAU.pdf

## Fylgiskjal 2. Uppskot til tímaætlan



## Fylgiskjal 3. Uppskot til tímaætlan



## Fylgiskjal 4. Útgreining av lønarútreiðslum

Á pedagogatstøðisútbúgvingini verða 58 vikur undirvísing um árið (tá er lærugreinin føroyskt C-støði íroknað). Starvsfólk knýtt at hesari útbúgvingini hava eina undirvísingarviku, sum í miðal sær soleiðis út, samanborið við skúlar aðrastaðni:

15,7 klokkutímar undirvísing pr. viku fulla tíð. (942 min.) (føroysk arbeiðsvika, 14,7 í donskum sáttmála)

51,3 min. fyrireiking pr. klokkutíma. Klokkutímar umroknaðir til min.: 805,4 min./60 min=13,4 t. fyrireiking (sambært donskum sáttmála)

**15,7 + 13,4 = 29,1 undirvísing og fyrireiking pr. viku fulla tíð.**

Arbeiðsvikan er 40 tímar, og sostatt eru uml. 11 tímar eftir um vikuna til aðrar uppgávur álagdar í kunngerð fyri útbúgvingarnar, so sum arbeiði við persónligum førleikum hjá næmingum, starvsvenjingarvitjanir, tvørfakligt toymisarbeiði v.m.

Arbeiðið við persónligum førleikum hjá næmingunum verður vektað høgt í yrkisfakligu útbúgvingunum, hetta tí at næmingarnir hava sera stóra ábyrgd í teirra arbeiði. Tí krevur hetta arbeiði eisini, at tíð verður sett av til samrøður við einstaka næmingin fleiri ferðir í útbúgvingartíðarskeiðinum.

**Frágreiðing um, hvussu komið verður fram til, hvussu nógv starvsfólk skulu til nýggju útbúgvingina**

58 vikur undirvísing eru í útbúgvingini árliga, tá ein flokkur verður tikin inn um árið. Umroknað til tímar: 30 tímar x 58 vikur=1.740 undirvísingartímar um árið.

Eitt starvsfólk, fulla tíð, undirvísir árliga í mesta lagi 15,7 tímar pr. viku og um árið 15,7 x 45 arbeiðsvikur árliga = 706,5 klokkutímar.

**1740/706,5 = 2,5 ársverk á bachelorstøði til undirvísing.**

Fyrireiking til c-støði í almennum lærugreinum er longri, og kostnaður fyri próvtøkur er hægri, av tí at tað krevst adjunktur til c-støði. Her verður mett ½ ársverk afturat.

**Íalt 3 ársverk undirvísarar.**

Hartil koma skrivara- og leiðsluuppgávur, sum eru uml. 1 ársverk.

**Viðmerkingar um aðrar lærarauppgávur**

Vert er at leggja til merkis, at ein umráðandi uppgáva hjá lærarunum er at arbeiða við persónligum førleikum hjá næmingunum, sum er álagt í kunngerð í hesum slagi av yrkisførleikagevandi útbúgvingum. Hetta arbeiði krevur rættiliga stóra arbeiðsorku frá lærarunum, og tí kann arbeiðsorkan hjá einum lærara í hesum útbúgvingunum ikki samanberast við aðrar miðnámsskúlar, ið ikki eru yrkisførleikagevandi og ikki arbeiða við persónligum førleikum.

Um undirvísing og fyrireiking fylla 29 tímar fulla tíð, so eru 11 tímar eftir um vikuna til m.a. tað arbeiðið, samstundis sum lærarin hevur aðrar fastar uppgávur, sum t.d. lestrarvegleiðing, orðblindavegleiðing, bókasavnsábyrgd, starvsvenjingarábyrgd og annað. Lærarar í Heilsuskúlanum hava fastar arbeiðstíðir, frá kl. 8.00 til kl. 16.00, og fara ikki heim, tá ið undirvísingin er liðug. Arbeiðshátturin er sostatt nógv øðrvísi enn í miðnámsskúlunum.

*Grundgevingar fyri øktum tørvi innan skrivara- og leiðsuuppgávur*

Í sambandi við at fleiri útbúgvingar koma í Heilsuskúlanum verða leiðsluuppgávurnar øktar í skúlanum.

Tær nógvu skiftisútbúgvingarnar krevja nógv samstarv og samskipan við starvsvenjingarstøð. Aðrar leiðsuuppgávur í sambandi við fleiri útbúgvingar eru t.d.: upptøka av næmingum, samrøður við næmingar í sambandi við upptøku, ábyrgd av útbúgvingarligum avleiðingum, tá næmingar ikki fylgja vanligari útbúgvingargongd, royndar- og próvtøkuhald, skrivia próvbók og próvskriving, ábyrgd av uppmøting og klaguviðgerðir.

**Skrivarauppgávur**

Núverandi skrivari kann ikki taka fleiri uppgávur á seg. Skrivarauppgávurnar eru umfatandi, tá talan er um eina skiftisútbúgving við skúla/starvsvenjing. Hetta kemst av tí samskifti, sum er við starvsvenjingarstøð viðvíkjandi fráboðan av næmingum, ið koma í starvsvenjing, móttøku av støðumetingum frá starvsvenjingini, mánaðarlig útrokning og útgjald av vegleiðaraviðbótum til vegleiðarar í starvsvenjing.

Harumframt er tað uppgávan hjá skrivaranum at vera við í upptøku av næmingum, innregistrering av umsóknum og við endan av útbúgving at vera við til próvtøkuhald og próvskriving. Skrivarin tekur sær eisini av samskiftinum við Studna, tá næmingar byrja og enda ella skifta millum starvsvenjing/skúla, hevur ábyrgd av kunning um avsláttarkort frá Strandferðsluni, er við at vátta fyri hvønn einstakan næming, ið søkir avsláttarkort, og hevur skráseting av uppmøting.

# 4. Suðuroyar Skeiðsdepil í Skúladeplinum í Suðuroy

Endamálið við hesum partinum av verkætlanini viðv. "Gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy", er at kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn Suðuroyar Skeiðsdepil við staðseting í Skúladeplinum í Suðuroy.

Endamálið er harumframt at gera ítøkiligt uppskot um, hvussu Suðuroyar Skeiðsdepil í Skúladeplinum í Suðuroy kann setast á stovn og skipast. Uppskotið skal eisini fevna um eina fíggjarætlan fyri Suðuroyar Skeiðsdepil.

## 4.1. Bakgrund

Førleikamenning er í dag vorðin ein avgerandi táttur, tá umræður bæði persónliga menning, menning av arbeiðsplássum og menning av samfelagnum í síni heild.

Fyri eitt øki sum Suðuroynna, har tilboðini um førleikamennandi útbúgvingar og skeið eru avmarkað, er tað av týdningi, at stig verða tikin til breitt at bjóða út fleiri førleikamennandi tilboð.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at settur verður á stovn Suðuroyar Skeiðsdepil í Skúladeplinum í Suðuroy, sum hevur til endamáls breitt at virka fyri førleikamenning við øllum Føroyum sum málbólki.

## 4.2. Suðuroyar Skeiðsdepil

Virksemi í Suðuroyar Skeiðsdepli skal m.a. fevna um:

- at skipa førleikamennandi skeið, útbúgvingar og eftirútbúgvingar
- saman við Heilsuskúla Føroya og Miðnámsskúlanum í Suðuroy at skipa nýggjar útbúgvingar
- at samskipa kunning og atkomiligheit til førleikamennandi útbúgvingar og eftirútbúgvingar umvegis fjarlestur
- at skipa onnur førleikamennandi tiltøk í Suðuroynni

Útbúgvingar- og skeiðstilboðini hava allar Føroyar sum málbólk.

### 4.2.1. Skipan

Suðuroyar Skeiðsdepil er sjálvsognarstovnur knýttur at Skúladeplinum í Suðuroy.

At leiða sjálvsognarstovnin Suðuroyar Skeiðsdepil verður vald ein fimm manna nevnd. Nevndin verður vald soleiðis: Mentamálaráðið velur ein lim, kommunurnar í Suðuroynni velja ein lim, ein nevndarlimur umboðar vinnulívið í Suðuroynni, og leiðarin í Miðnámsskúlanum í Suðuroynni og leiðarin í Heilsuskúla Føroya eru limir í nevndini.

Nevndin setir dagligan leiðara, sum hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum í Suðuroyar Skeiðsdepli.

### 4.2.2. Fíggingarleistur

Raksturin hjá Suðuroyar Skeiðsdepli verður fyrstu trý árini skipaður við royndarskipan, har Mentamálaráðið fíggjar helvtina av rakstrinum (hetta samsvarandi ynskinum um politiskt at raðfesta gagnnýtsluna av Skúladeplinum í Suðuroy). Hin helvtin av rakstrinum verður fíggjaður av kommununum í Suðuroynni og brúkaragjaldi í sambandi við fyriskipað skeið.

Eftir trý ár skal Suðuroyar Skeiðsdepil verða sjálvfíggjandi.

## Fíggjarætlan fyri Suðuroyar Skeiðsdepil

| **Skeiðsdagar um árið** | **30** | **60** | **90** | **120** |
|---|---|---|---|---|
| | **Ár 1** | **Ár 2** | **Ár 3** | **Ár 4** |
| ***Inntøkur*** | | | | |
| MMR | 200.000 | 200.000 | 200.000 | |
| Stuðul frá kommununum í Suðuroynni | 100.000 | 100.000 | 100.000 | |
| Kommunugjald leiðari kvøldskúlans | 75.000 | 75.000 | 75.000 | 75.000 |
| Brúkaragjald (sí niðanfyri fíggjarætlan pr. dagskeið) | 360.000 | 720.000 | 1.080.000 | 1.440.000 |
| Annað | | | | |
| *Tilsamans* | 735.000 | 1.095.000 | 1.455.000 | 1.515.000 |
| ***Útreiðslur*** | | | | |
| Løn til leiðara | 400.000 | 500.000 | 550.000 | 550.000 |
| Skeið | | | | |
| Løn til skeiðshaldarar | 105.000 | 210.000 | 315.000 | 420.000 |
| Gjald í smb. við nýtslu av hølum[1] | 72.000 | 144.000 | 216.000 | 288.000 |
| Útreiðslur til skeið[2] | 45.000 | 90.000 | 135.000 | 180.000 |
| Teldu- og skrivstovuútgerð (1. árið) | 30.000 | | | |
| Marknaðarføring o.t. | 9.000 | 18.000 | 27.000 | 36.000 |
| Bókhald og grannskoðan | 4.500 | 9.000 | 13.500 | 18.000 |
| Tilsamans | 265.500 | 471.000 | 706.500 | 942.000 |
| Annað | 25.000 | 50.000 | 50.000 | |
| *Tilsamans* | 690.500 | 1.021.000 | 1.306.500 | 1.492.000 |
| | | | | |
| **Úrslit** | **44.500** | **74.000** | **148.500** | **23.000** |

## Fíggjarætlan pr. skeiðsdag

*Útgangsstøðið: Ein skeiðsdagur í 7 tímar fyri 15 brúkarar, við døgurða og kaffi/frukt o.a. morgun og seinnapart - gjald pr. luttakarar 1.000 kr.*

| **Fíggjarætlan pr. skeiðsdag** | |
|---|---|
| *Uttan mvg* | |
| | |
| *Tal av skeiðsluttakarum* | 15 |
| *Skeið (tímar)* | 7 |
| | |
| *Inntøkur* | |
| Skeiðsgjøld (800 kr. pr. persón) | 12.000 |
| *Tilsamans* | *12.000* |
| | |
| *Útreiðslur* | |
| Gjald til skeiðshaldara (500 kr. pr tíma) | 3.500 |
| Matur, kaffi og frukt (160 kr. pr. persón) | 2.400 |
| Skeiðstilfar (100 kr. pr. persón) | 1.500 |
| Marknaðarføring / lýsingar | 3.000 |
| Bókhald (20 kr. pr. persón) | 300 |
| Reingerð o.a. (10 kr. pr. persón) | 150 |
| *Tilsamans* | *10.850* |
| | |
| *Úrslit pr. dagskeið* | *1.150* |

### 4.2.3. Arbeiðsætlan hereftir

Er politisk undirtøka fyri at seta á stovn Suðuroyar Skeiðsdepil, við fíggjarligum stuðli frá Mentamálaráðnum fyrstu trý árini, verður beinanvegin farið undir at fyrireika stovnan av sjálvognarstovninum *Suðuroyar Skeiðsdepil*. Arbeiðsbólkurin viðv. "Gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy" tekur stig til, at hetta arbeiðið verður byrjað.

# 5. Næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy

Endamálið við hesum partinum av verkætlanini viðv. "Gagnnýtslu av Skúladeplinum í Suðuroy", er at gera uppskot til bygging av einum næmingaheimi við Skúladepilin í Suðuroy.

Endamálið er har umframt meira ítøkiliga:

- at gera tekningar av næmingaheiminum
- at gera kostnaðarætlan fyri bygging av næmingaheiminum
- at gera rakstrarætlan fyri dagliga raksturin av næmingaheiminum

- Og um politiskur vilji er til at lata stuðul til verkætlanina sambært *Løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving,* eisini:

- at byggja eitt næmingaheim við Skúladeplinum í Suðuroy
- at byggja næmingaheim við 44 íbúðum við tilsamans 88 kømrum. Bygt verður í íbúðareindum við 4 íbúðum í hvørjari eind, tilsamans 11 íbúðareindir.
- at byggja felagshús við næmingaheimið
- byggikostnaðurin av næmingaheiminum skal í mesta lagi verða 20 mió. kr.
- leigu kostnaðurin pr. kamar verður í minsta lagi 1.800 kr.[1] um mánaðin og í mesta lagi verða 2.500 kr.[2] um mánaðin.

## 5.1. Bakgrund

Umframt verkætlanina um at byggja eitt næmingaheim hevur arbeiðsbólkurin eisini ítøkilig tilmæli um fleiri útbúgvingar- og skeiðstilboð við Skúladepilin í Suðuroy. Hesi tilboð eru ikki beinleiðis tengd at, um eitt næmingaheim verður bygt. Eitt næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy fer tó at lætta um møguleikan hjá lesandi og skeiðsluttakarum at finna sær bústað í lestrar- og skeiðstíðini.

Eitt næmingaheim fer eisini at skapa betri grundarlag fyri, at Skúladepilin í Suðuroy við nýggjum útbúgvingar- og skeiðstilboðum kann gerast uppaftur meira týðandi partur av lokalsamfelagnum í Suðuroy.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at eitt næmingaheim verður bygt við Skúladepilin í Suðuroy.

## 5.2. Tekningar

Andrias Jacobsen, byggifrøðingur, er biðin um at gera uppskot um, hvussu eitt næmingaheim kann byggjast. Uppskotið fevnir um at gera tekningar og kostnaðarætlan fyri byggikostnaðin av næmingaheiminum.

---

[1] Eitt kamara á einum av næmingaheimunum í Keypmannahavn, har tú hevur egið baðirúm, men felags køk við 12 onnur kømur, kostar 1.952 kr. (Støddin á kamarinum er 13,5 m2, og við gangi og baðirúmi tilsamans er 18,5 m2).

[2] Ein íbúð við <u>2 kømrum</u> afturat alrúmi v/køk og stovu, sum tilsamans er 44 m2 kostar í Keypmannahavn 4.618 kr. um mánaðin.
Ein íbúð við <u>1 kamari</u> afturat alrúmi v/køk og stovu, sum tilsamans er 36 m2 kostar í Keypmannahavn 4.143 kr. um mánaðin.

*Útgangsstøðið hjá Andriasi Jacobsen, byggifrøðingi, hevur verið ætlanin um at byggja eitt næmingaheim við felagshúsi, har byggikostnaðurin við innbúgvi ikki fer upp um 20 mió. kr.*

## 5.3. Íbúðareindir

Mælt verður til at byggja næmingaheimið í íbúðareindum við 4 íbúðum í hvørjari eind. Hvør íbúð verður 36 $m^2$. Í hvørjari íbúð verður: durur, baðirúm, tvey kømur, alrúm við køki og stovu, og útgongd til terassu. Støddir á rúmum: Kamar umleið 6,7 m2, baðirúm umleið 4 m2, alrúm v/køki og stovu umleið 16 m2, tilsamans er støddin umleið 33,4 m2 netto.

Hvør íbúðareind (við 4 íbúðum) verður 144 $m^2$. Bygdar verða 11 íbúðareindir, tilsamans 44 íbúðir. Sostatt verða tað tilsamans 88 kømur í næmingaheiminum.

## 5.4. Felagshús

Umframt íbúðareindir sum næmingaheim, verður bygt eitt felagshús eftir sama leisti, soleiðis at íbúðareindirnar og felagshúsið av útsjónd eru eins. Felagshúsið verður 144 $m^2$.

Í felagshúsinum verður ein eind við vaskimaskinum og turkitrumlum. Harumframt verður í felagshúsinum tvey størri høli (sum tó kunnu leggjast saman til eitt stórt høli), sum kunnu brúkast sum undirvísingarhøli hjá Skúladeplinum og annars til felagstiltøk, veitslur og føðingardagar hjá búfólkum á næmingaheiminum.

## 5.5. Kumpassin við Skúladepilin í Suðuroy

Næmingaheim við Skúladepilin í Suðuroy verður bygt undir heitinum *Kumpassin við Skúladepilin í Suðuroy*, eins og víst í loftmyndini niðanfyri.

Kumpassin hevur í árhundraðir verið ein hjálp hjá fólki, tá tey skuldu vinna fram á leið. Í føroyskum høpi hevur kumpassin verið eitt lívsneyðugt amboð hjá okkara siglandi fólki og er á henda hátt vorðin ein partur av okkara samleika. Spurningurin *um at seta røttu kós* er eisini ein inngrógvin partur av okkara gerandisdegi. Symbolskt kann kumpassin sigast verða ein vegvísi fram á leið.

Skúladepilin í Suðuroy er fyri nógv eitt stig á teirra lívsleið – antin talan er um ung fólk í miðnámsútbúgving í Miðnámsskúlanum ella ung og tilkomin á einari yrkisfakligari útbúgving í Heilsuskúla Føroya.




*Loftmynd av Kumpassini við Skúladepilin í Suðuroy*
*12 eindir, 11 íbúðareindir og 1 felagshús*

Í hvørjum horni – hvørjari høvuðsætt – av kumpassini og millum høvuðsættirnar verða bygdar íbúðareindir. Felagshúsið verður í eystaru ættini av kumpassini við útsýni yvir Hovsfjørð.

Fríøki verða millum íbúðareindirnar. Og millum íbúðareindirnar í høvuðsættunum verða lagdir flisar, soleiðis at tað úr fjarstøðu sæst, at næmingaheimið er skipað sum ein kumpass.

## *Tekningar*



*Mynd 1. 11 íbúðareindir og 1 felagshús.*
*(ein síða í hvørjari eind er á myndini transparent)*



*Mynd 2. 11 íbúðareindir og 1 felagshús.*
*(ein síða í hvørjar eind er á myndini transparent)*



*Mynd 3. Íbúðareind við fýra íbúðum (uttan tak)*



*Mynd 4. Tvær av fýra íbúðum í íbúðareindini (uttan tak)*



*Mynd 5. Felagshús (uttan tak)*
*Við felagshølum til næmingaheimið (36 m²) og tveimum undirvísingarhølum, sum kunnu gerast til størri høli sum antin eru 72 m² ella 108 m² til støddar.*

## 5.6. Grønir bygningar

Bygningarnar verða gjørdir sum grønir bygningar. Tað vil siga, at bygt verður soleiðis, at bygningarnir brúka sum minst av orku, endurnýta orkuna (t.d. heita vatnið), umframt at bygningarnir verða lutvíst hitaðir av t.d. sólorku ella jarðhita.

## 5.7. Kostnaðarmeting

Út frá tekningunum omanfyri eru heintað inn tilboð uppá byggingina av íbúðareindunum/ næmingaheiminum og felagshúsinum, har kravið er, at talan er um lyklaklárar eindir. Harumframt eru heintað inn tilboð uppá innbúgv. Mett er um aðrar kostnaðir.

# Byggikostnaður

| | |
|---|---|
| Tilboð uppá lyklaklárar 11 íbúðareindir og 1 felagshús | 12.000.000 |
| Lendisarbeiðið | 3.000.000 |
| P-økið og VVS | 2.000.000 |
| Tekningar, eftirlit og góðkenningar | 1.000.000 |
| Aðrar útreiðslur | 510.000 |
| Innbúgv til íbúðir og felagshús | 1.120.000 |
| Stovnan og tinglýsing | 370.000 |
| **Byggikostnaður tilsamans** | **20.000.000** |

Umframt byggikostnaðin kemur kostnaðurin av grundstykki.

## 5.8. Fígging

Fíggingin til byggingina av næmingaheimi við Skúladepilin í Suðuroy er fingin til vega, umframt at stovnsfæið til stovnan *av Sjálvsognarstovninum Næmingaheimið við Skúladepilin í Suðuroy* er tøkt.

Sambært grein 3 í *Løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving* kann Landið veita stuðul upp til 65% av byggikostnaðinum ella keypsprísi og umbyggingarkostnaði í sambandi við 1) Bygging av nýggjum bústaðarhúsum, ella 2) Keyp og umbygging av verandi bygningum til bústaðarhús.

Mælt verður til, at byggingin av næmingaheimi við Skúladepilin í Suðuroy verður fíggjað soleiðis:

# Fígging

| | |
|---|---|
| Stuðul frá Landinum til næmingaheim* | 13.000.000 |
| Stovnsfæ | 2.000.000 |
| Fígging frá lánistovni | 5.000.000 |
| Tilsamans | 20.000.000 |

** Løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving*

## 5.9. Rakstrarætlan

### Rakstrarætlan

| **Útreiðslur um mánaðin** | Kr. pr. kamar | Tal | |
|---|---|---|---|
| Seriulán, 30 år, 5,25% í rentu | | | 30.115 |
| Hiti og el pr. Kamar | 750 | 48 | 30.480 |
| Viðlíkahald av bygningunum | 2,5% | | 33.333 |
| Umsjónarfólk og stýri | | | 15.000 |
| Tryggingar vm. | | | 10.000 |
| Aðrar útreiðslur | | | 5.154 |
| **Tilsamans** | | | **124.082** |

| **Inntøkur um mánaðin** | Kr. pr. kamar | Tal | |
|---|---|---|---|
| Einkult-kømur (íbúð einsamøll/-mallur) | 2.500 | 13 | 32.500 |
| Dupult-kømur (íbúð saman við øðrum) | 1.800 | 26 | 46.800 |
| "Sommerschool" | 6.000 | 2 | 13.200 |
| Útleigan til brúk sum skúlastovur | 4.000 | 2 | 8.000 |
| Stuðul frá Landinum til rentur og avdrátt* | | | 24.780 |
| **Tilsamans** | | | **125.280** |

| | |
|---|---|
| **Avlop um mánaðin í kr.** | **1.198** |

** Løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving*

**Viðmerkingar og fyritreytir**
Í útreiðslunum eru lánsgjaldið, bæði rentur og avdráttur, tikið við.
Avdráttur og viðlíkahald svara til avskrivingina av bygningunum.
Býtið av kømrum er: 50% einkult kømur, 50% dupult kømur.
Tilsamans 11 eindir við fýra íbúðum í hvørjari eind.
Í helvtini av íbúðunum eru bæði kømrini útleigað 11 mánaðir um árið.
Í helvtini av íbúðunum er eitt kamar útleigað 11 mánaðir um árið.
Tilsamans 65% belægning alt árið.
Sommerskole rindar 6.000 kr. pr. íbúð um mánaðin, 1 mánað um árið.
Tey, sum ynskja íbúðina fyri seg sjálvan, rinda 2.500 kr. í leigu.
Eru bæði kømrini íbúðini útleigað, er leigan 1.800 kr. pr. kamar, tilsamans 3.600 kr. pr. íbúð.
Skal rakstrarætlanin javnviga, er krav um minsta belægning á 65%-belægning um árið.

Um samanborið verður við kostnaðin av at leiga kømur og íbúðir á næmingaheimum í Keypmannahavn, so er mánaðarleigan fyri eitt kamar á næmingaheiminum við Skúladepilin í Suðuroy eitt sindur lægri enn í Keypmannahavn, meðan leigan fyri eina íbúð við tveimum kømrum er væl lægri enn í Keypmannahavn.

Eitt kamar á einum av næmingaheimunum í Keypmannahavn, har tú hevur egið baðirúm, men felags køk við 12 onnur kømur, og støddin á kamarinum er 13,5 $m^2$, og við gangi og baðirúmi tilsamans er 18,5 $m^2$, kostar 1.952 kr. Næmingaheimið við Skúladepilin í Suðuroy: mánaðarleiga 1.800 kr. pr. kamar, felagskøk og bað við 1 persóni.

Ein íbúð á sama næmingaheimi við 1 kamari, afturat alrúmi v/køk og stovu, sum tilsamans er 36 $m^2$ kostar í Keypmannahavn 4.143 kr. um mánaðin. Meðan ein íbúð við 2 kømrum, afturat alrúmi v/køk og stovu, sum tilsamans er 44 $m^2$ kostar í Keypmannahavn 4.618 kr. um mánaðin. Næmingaheimið við Skúladepilin í Suðuroy: mánaðarleiga 2.500 kr. pr. íbúð við 2 kømrum.

## 5.10. Arbeiðsætlan hereftir

Verður politiskt tikið undir við verkætlanini og peningur settur av til at stuðla verkætlanini sambært *Løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving*, verður byggingin av næmingaheimi við Skúladepilin í Suðuroy framd í 2012. “Sjálvsognarstovnurin næmingaheimið við Skúladepilin í Suðuroy” verður stovnaður at gjøgnumføra verkætlanina.

## Fylgiskjal 1. Løgtingslóg um stuðul til næmingaheim

# LØGTINGSLÓG NR. 63 FRÁ 23. JUNI 1983 UM BÚSTAÐARHÚS TIL FÓLK Í ÚTBÚGVING / OM KOLLEGIER TIL FOLK UNDER UDDANNELSE, SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 127 FRÁ 25. OKTOBER 1988.

**Løgtingslóg nr. 63 frá 23.06.1983**

- Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

**§ 1.** Eftir reglunum í hesi lóg verður studningur latin til bústaðarhús, sum hava til endamál at hýsa fólki í útbúgving og tryggja teimum gott og hóskandi tilhald í útbúgvingartíðini.

**§ 2.** Studningur verður latin til:

1) Bygging av nýggjum bústaðarhúsum.
2) Keyp og umbygging av verandi bygningum til bústaðarhús.
3) Rakstur av bústaðarhúsum.

**§ 3.** Studningur kann veitast við upp til 65% av byggikostnaðinum ella keypsprísi og umbyggingarkostnaði.
*2. stk.* Studningurin er treytaður av, at viðkomandi stovnur hevur eginpening, sum, tá talan er um nýbygging, svarar til virðið av byggibúnum grundøki og annars til 10% av keypsprísi og umbyggingarkostnaði.

**§ 4.** Studningurin verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán við pantirætti í ognini innanfyri 90% av virðinum.

**§ 5.** Umsøkjarar, ið eru farnir undir bygging, keyp ella umbygging av bústaðarhúsi uttan frammanundan at vissa sær góðkenning landsstýrisins, kunnu ikki rokna við studningi úr landskassanum.

**§ 6.** Í rakstrarstudningi kann veitast upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum.

**§ 7.** Bústaðarhús, sum studningur verður latin til, skal vera sjálveigandi stovnur og skal hava viðtøkur, sum eru góðtiknar av landsstýrinum.
2*)2. stk.* Verða bústaðarhús ikki longur nýtt til endamálið ella verða tey seld, fellur tann parturin av ognarvirðinum ávikavist nettosøluprísinum, sum lutfalsliga svarar til tann studning, sum er veittur eftir § 3 í hesi lóg, samanber § 2, pkt. 1) ella 2), til landskassan, og landsstýrið ger av, hvussu hesin parturin av ognarvirðinum ávikavist nettosøluprísinum skal nýtast.

**§ 8.** Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 34 frá 27. mai 1968 um lærlingaheim.

1) Broytt við løgtingslóg nr. 127 frá 25. oktober 1988

2) Broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 1988